# Eftir skatt er føroyska pensjónin farin upp um ta donsku

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður



Tá ið formaðurin í Landsfelag Pensjonistanna sigur, at føroyska fólkapensjónin við ískoytum er dragnað munandi seinastu árini samanborið við ta donsku, so er tað ikki rætt. Tvørturímóti er føroyska pensjónin í hesum samgonguskeiðinum vaksin munandi meir enn tann danska. Og tá vit samanbera tøku pensjónina, tvs. aftaná skatt, er føroyska pensjónin farin upp um ta donsku.

Hetta er sjón fyri søgn í talvuni niðanfyri, ið fylgir uppgerðarháttinum í Nordisk Socialstatistisk Årbog. Sum ískoyti til donsku pensjónina er sonevndi eldrakekkurin tikin við. Og sum ískoyti til føroysku pensjónina er viðbót til ávísar pensjonistar (sonevndi brennistudningurin) tikin við, umframt Samhaldsfasti.

**Samhaldsfasti ger munin**

Tað er Samhaldsfasti, ið ger tann stóra munin millum føroysku og donsku pensjónina. Og tað er har stóra hækkingin í føroysku pensjónini er hend seinastu 3 árini, soleiðis at útgjaldið hækkar heilt upp í 1860 kr um mánaðin nú frá 1.jan. 2007. Og um eitt ár fer hann upp á 2.200 kr. um mánaðin.

Júst sum tað verður gjørt í Nordisk Socialstatistisk Årbog, eigur Samhaldsfasti sjálvsagt at roknast uppí sum ískoyti: tí eins og øll, sum fylla 67, eiga rætt til fólkapensjón, eiga øll sum fylla 67 eisini rætt til Samhaldsfasta. Einhvør borgari fær Samhaldsfasta, uttan mun til um man hevur havt stóra, lítla ella onga inntøku á arbeiðsmarknaðinum – øll fáa tað sama – og tí er Samhaldsfasti ikki ein arbeiðsmarknaðarpensjón men ein almannapensjón eins og fólkapensjónin.

Tí er tað óreiðiligt at blíva við at tosa um fólkapensjónina, uttan at vilja rokna Samhaldsfasta við, ikki minst tá man samanber við donsku pensjónina.

**Lægri skattur ger munin í tøkari pensjón**

Í Danmark ber øll pensjónin skatt, og haraftrat við munandi hægri prosenti enn í Føroyum.

Í Føroyum eru grundupphædd og brennistudningur skattafrí, og restin (t.v.s. knappliga helvtin) ber ein munandi lægri skattaprosent enn í Danmark. Móti hesum ger tað lítlan og ongan mun, at danski botnfrádrátturin er nakað hægri enn tann føroyski.

Um man skal samanbera skattingina av pensjónini í Føroyum og Danmark í 2007, svarar føroyski skatturin til 6–7% av allari føroysku pensjónsveitingini, meðan danski skatturin svarar til 23–27% av allari donsku pensjónsveitingini.

**Men framvegis eru skeivleikar at rætta**

Hóast tað sum er nevnt omanfyri, er framvegis neyðugt at bøta munandi um føroysku pensjónirnar. Eitt er framhaldandi at hækka upphæddirnar í tráð við inntøkuvøkstur og kostnaðarhækkingar í samfelagnum. Men tað eru eisini stórir skeivleikar at rætta, sum t.d. tá annar av hjúnunum, sum onga aðra inntøku hevur, missir alt ov nógv í viðbót og í skatti av samhaldsfasta, tí hin hjúnafelagin hevur eina hampiliga inntøku, antin tí hann/hon enn er virkin á arbeiðsmarknaðinum ella fær eina góða eftirlønaruppsparing. Hetta er óvirðiligt og avgjørt eitt brek við pensjónsskipanini, sum má rættast í samband við arbeiðið við einum pensjónsreformi.

**Niðurstøðan er tó greið**

Av talvuni sæst, at áðrenn skatt fær ein stakur einar 1100 kr. minni og eini hjún knappar 500 kr. minni í Føroyum enn í Danmark. Men aftaná skatt er vent í holuni: tá fær ein stakur góðar 1000 kr. meir og eini hjún 2100 kr. meir í Føroyum enn í Danmark.

Annars skal eg lata tølini í talvuni og í strikumyndunum tala fyri seg sjálvan.

**Fólkapensjón við øðrum ískoyti, áðrenn og eftir skatt pr. mánað til fólk, sum ikki hava aðra inntøku**

| | 2004 Føroyar | 2004 Danmark | Munur Fø-Dk 2004 | 2007 Føroyar | 2007 Danmark | Munur Fø-Dk 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| ***Støk*** | | | | | | |
| Grundupphædd | 4.169 | 4.648 | | 4.169 | 4.952 | |
| Viðbót | 2.544 | 4.679 | | 2.862 | 4.985 | |
| Samhaldsfasti | 697 | - | | 1.860 | - | |
| Viðbót t. ávís. pensj./ældrecheck | 415 | 425 | | 558 | 633 | |
| **- Tils. áðrenn skatt** | **7.825** | **9.752** | **-1.927** | **9.449** | **10.570** | **-1.121** |
| **- Tils. aftaná skatt** | **7.459** | **7.159** | **300** | **8.775** | **7.748** | **1.027** |
| ***Hjún, bæði pensjonistar*** | | | | | | |
| Grundupphædd | 6.626 | 9.296 | | 6.626 | 9.904 | |
| Viðbót | 3.938 | 4.368 | | 4.430 | 4.656 | |
| Samhaldsfasti | 1.394 | | | 3.720 | - | |
| Viðbót t. ávís. pensj./ældrecheck | 415 | 850 | | 558 | 1.266 | |
| **- Tils. áðrenn skatt** | **12.373** | **14.514** | **-2.141** | **15.334** | **15.826** | **-492** |
| **- Tils. aftaná skatt** | **11.942** | **11.264** | **678** | **14.351** | **12.242** | **2.109** |

Kelda: Nordisk Socialstatistisk Årbog og Almanna- og heilsumálaráðið, Fíggjardeildin (sum hevur gjørt metingina av 2007)













| Støk | áðrenn skatt 2004 | áðrenn skatt 2007 | eftir skatt 2004 | eftir skatt 2007 |
|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 7825 | 9449 | 7459 | 8775 |
| Danmark | 9752 | 10570 | 7159 | 7748 |

| Hjún | áðrenn skatt 2004 | áðrenn skatt 2007 | eftir skatt 2004 | eftir skatt 2007 |
|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 12373 | 15334 | 11942 | 14351 |
| Danmark | 14514 | 15826 | 11264 | 12242 |

*Í skattaútrokningini av føroysku pensjónunum er brúkt miðal kommunala skattaprosentið fyri alt landið uppá 20,6%”*

# Towering Cowards

Towering cowards
Towering cowards

Aw warring, aw words
babble
March onwards
Arch in words

Pow
Err
Power
A word
Powered
by
Babel
The
Tower
of
Power

Powered by towering cowards
Towering cowards
Cowards

“The light shines in the darkness
And the darkness
Does not overcome it” John 1:5

Words of wisdom, holy kingdom
Shedding light
On this sacred writ

For the soul
There is no birth or death

You men of power
Sons of Seth

Even your souls must choose
Between light and darkness

When will you choose
peace and love
And rid us of your wars and
harshness

“What does a man profit”
if he gains everything
and loses his soul” John 3:16

Killing many for profit
And material things
While death takes its toll.

No matter how much you try
Your lies will always die
The truth will outlive the lie

You talk about a nations freedom
Yet you rig your elections outcome

Your avarice for wealth and power
Has soured
you all
into tall
Towering Cowards

**By: Anna Iachino @ KODA 2006**

# Spurningur til Oddmar á Steig

ÁRNI J OENSEN
Esbjerg

Í lesarabrævi í Dimmalætting tann 12. desember mæla tygum Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið um at lata tey samkyndu fáa somu rættindi í Føroyum sum í t.d. Danmark.

Tygum skriva:

- Eg eri heilt sannførdur um, at helst verður tað forbannilsi fyri tjóð okkara fyrr ella seinni, tað vísir søgan púra greitt, t.d. Sodoma, Pompeji, Herkulanum, Danmark o.s.fr.

Kunnu tygum siga mær og øðrum undrandi føroyingum í Danmark, hvat forbannilsi er komið niður yvir Danmark, síðani revsilógin her bleiv broytt?

Annars hevði tað verið forvitnisligt at frætt, hvørji støð ella lond tygum hugsa um, tá tygum enda brotið omanfyri við styttingini o.s.fr.